# Nú kemur týsdagstúrurin til Skotlands



*Clare fer í vetur at sigla við farmi úr Føroyum til Aberdeen hvønn týsdag*

*Savnsmynd*

**Farmaskipið Clare, sum Smyril Line leigar, fer frá 1. oktober at sigla til Skotlands, eins og framvegis verður siglt til Hanstholm fríggjakvøld. Hósdagstúrurin til Danmarkar verður enn sum áður sigldur við Norrønu vetrarhálvuna. Tá nýggja Norrøna er komin í sigling, fer hon at røkja vetrarsiglingina til Skotlands**

ÚTFLUTNINGSRUTA
*Edvard Joensen*

Útflutningsmøguleikarnir hjá føroyingum batna munandi, tá Smnyril Line fer at senda skip til Skotlands hvønn týsdag. Nýggja ferðaætlanin kemur í gildi tann 1. oktober.

Farmaskipið Clare, sum Smyril Line leigar, fer frá fyrsta oktober at sigla hvønn týsdag til Aberdeen. Hugsað verður fyrst og fremst um útflutning av feskum fiski, sigur Smyril Line.

Týsdagstúrurin hjá Clare byrjar sum nakað nýtt í Klaksvík týsdag klokkan 15.00, og av Havnini verður farið klokkan 18.00 beinleiðis til Aberdeen.

Á veg heimaftur verður lagt at á Drelnesi hóskvøld, og síðan verður farið til Havnar.

Fríggjakvøld fer Clare so av Havnini klokkan 18.00 umvegis Drelnes til Hanstholm.

Norrøna siglir eisini í vetur av Havnini hóskvøld umvegis Lerwick í Hetlandi til Hanstholm og sama veg heimaftur. Komið verður aftur á Havnina mánamorgun klokkan 06.00. Vetrarferðaætlanin hjá Norrønu byrjar úr Hanstholm leygardagin í komandi viku, tann 14. september.

## Uppbygging

Smyril Line hevði tíðindafund mánamorgunin, har nýggja rutan varð kunngjørd.

Smyril Line ætlar við nýggju rutuni hjá Clare til Aberdeen at økja møguleikarnar hjá føroyskum útflytarum at náa europeiska marknaðinum, sigur Óli Hammer, stjóri á Smyril Line. Clare kann eisini taka 12 ferðafólk umframt bilar við á hvørjum túrinum.

Í fyrsta umfari verður tað farmaskipið Clare, sum Smyril Line hevur leigað nú í eina tíð, sum fer at sigla til Skotlands. Men næsta vetur aftur fer nýggja Norrøna at taka yvir. Tá so Norrøna fer í summarsigling, verður eitt ro-ro skip leigað at røkja farmarutuna til Skotlands.

Óli Hammer segði á tíðindafundinum, at áhugi er millum útflytarar í Føroyum at brúka eina rutu fyrrapart í viku. Tað fer at gera tað møguligt at røkka vikuskiftissøluni inni á europeiska meginlandinum, eitt nú í Boulogne í Fraklandi, har nógvur feskur fiskur verður seldur.

Men Nýggja Norrøna fer ikki at sigla til Aberdeen, uttan onkra havn nakað syðri, upplýsti stjórin á Smyril Line á tíðindafundinum mánamorgunin. Grundin er tann, at Norrøna verður ov breið til innsiglingina í havnini í Aberdeen, sum eisini er heldur ótrygg á onkrari ávísari ætt, og av og á verður stongd vegna veðurlíkindi.

Føroyingar fara tí at uppliva at fáa eitt skip, sum er ov stórt at sigla til Aberdeen við.

Hvør komandi havnin hjá Norrønu í Skotlandi skal vera, vildi Óli Hammer ikki upplýsa, tí enn eru samráðingar við viðkomandi myndugleikar í Skotlandi um tað. Kortini helt hann fyri, at Edinbourgh er ikki minni áhugaverdur býur at vitja, enn Aberdeen er, uttan tó at vilja vátta ella avsanna, at tað verður so langt suður, Norrøna fer at sigla.

## Fleiri ferðafólk

Tá nýggja Norrøna fer at sigla til Skotland, verða ferðamøguleikarnir hjá føroyingum tann vegin munandi betri, enn teir eru í dag.

Í vetur fer Norrøna at leggja at í Hetlandi á veg til og úr Danmark, og tað merkist longu nú á fyrispurningunum, segði Óli Hammer á tíðindafundinum mánadagin.

Hann greiddi frá, at bara til tann fyrsta túrin hava 500 fólk longu bílagt sær ferðaseðil úr Hanstholm til Lerwick og Havnar.

Av Smyril Line verður sagt, at ferðafólkaflutningurin í vetrarhálvuni øktist munandi í fjør, og longu nú síggja tølini væl út fyri komandi vetur.

Óli Hammer, stjóri, segði á tíðindafundinum, at longu seinasta vár var ferðafólkatalið hægri, enn roknað varð við alla vetrarsiglingina.

At Norrøna í vetur fer at sigla til Lerwick, ger eisini møguleikarnar hjá føroyingum at koma til Skotlands munandi betri hesa tíðina, tí úr Lerwick verður sambandið munandi betri, tá nýtt reiðarí fer at sigla við spildurnýggjum skipum til Aberdeen um mánaðaskiftið komandi.

Møguleikar verða tá hjá føroyingum at skipa fyri bólkaferðum, vinnuferðum og tílíkum og á tann hátt fáa gagn av betraða ferðasambandinum tann vegin, eins og teimum møguleikum, sum Skotland hevur at bjóða, meta tey á Smyril Line.



*Tá nýggja Norrøna, sum júst er flotað, fer at sigla til Skotlands, fara ferðamøguleikarnir tann vegin at batna heilt munandi í vetrarhálvuni*

*Mynd: Jan Müller*

# ítróttur

Nr. 167 • týsdagur • 3. september 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Brotsteigurin skal vera manntómur

**Jens Petur Brattalíð vildi ikki hava, at nakar skuldi hjálpa til, tá Øssur Hansen fyrireikaði seg til at skjóta brotsspark, og kappingarnevndin hevur gjørt av, at B68 og B36 skulu spæla umaftur í kvøld**

ILLVEÐURSDYSTUR
*Jóannes Hansen*

Tað vóru fleiri, sum tóktust vera til reiðar at hjálpa til, tá Øssur Hansen í nógva vindinum og regninum á Svangaskarði sunnudagin skuldi skjóta brotsspark ímóti málinum hjá René Tórgarð.

Men dómarin, Jens Petur Brattalíð, segði, at tað kundi ikki verða talingur um sovorna hjálp:

– Reglurnar siga, at tá brotsspark verður tikið, skulu eingir aðrir spælarar vera í brotsteiginum enn teir báðir, sum eru uppií. Tað vil siga málverjin og so tann, sum skal skjóta brotsspark. Um talan hevði verið um fríspark ella hornaspark, so hevði einki verið í vegin fyri, at onkur spælari syrgdi fyri, at bólturin lá stillur, men tað kundi ikki koma upp á tal, tá talan var um brotsspark, sigur dómarin.

Bólturin fekst ikki at liggja, og so bríkslaði dómarin fyri síðstu ferð.



## Umaftur í kvøld

Karl Vidtfeldt, formaður í kappingarnevndini hjá FSF og kappingarstjóri, sigur, at nýggjur dystur verður spældur á Svangaskarði í kvøld klokkan 18.30:

– Vit halda okkum til grein 32 í kappingarreglunum fyri fótbólt. Har verður í øðrum stykki umrøtt, hvat skal gerast, tá líkindini ikki eru nóg góð at spæla. Dysturin kann í mesta lagi útsetast ein tíma. Um dysturin ikki verður liðugt spældur, skal kappingarnevndin hava boð um hetta, og so verður nýggjur dystur ásettur. Tað er hetta, sum vit nú hava gjørt, sigur Karl Vidtfeldt.

Hevði talan verið um eitt nú tennisdyst í Wimbledon, so høvdu reglurnar verið øðrvísi. Har er tað soleiðis, at dysturin verður niðurlagdur, um regn ella illveður ger, at tað ikki ber til at spæla. So verður dysturin tikin upp aftur, har hann var komin til. Um hesar reglurnar høvdu verið galdandi, so hevði dysturin byrjað aftur við, at støðan hevði verið 3–1 til B36, og við at Øssur Hansen skuldi skotið brotsspark!!

Annars skilja vit á formanninum í kappingarnevndini, at dómarin var eitt sindur ivasamur, um tað yvirhøvur vóru líkindi at fara undir dystin á Toftum. Men hann gjørdi av, at tað skuldi roynast. Veðrið øtlaði, og um teir ikki vóru givnir, tí bólturin ikki fekst at liggja, so hevði verið neyðugt at gevast eina lítla løtu seinni, tá veðrið versnaði heilt nógv.

Nú verður talan um nýggjan dyst, og tað ber væl til at ímynda sær, at venjararnir fara at gera onkrar skiftingar á liðnum.

Reglurnar siga, at tá brotsspark verður tikið, skulu eingir aðrir spælarar vera í brotsteiginum enn teir báðir, sum eru uppií, sigur Jens Petur Brattalíð, sum at enda sá seg noyddan at blása dystin millum B68 og B36 av



Tilboðsferðir

frá Atlantic Airways



Serlig APEX-ferð til Keypmannahavnar

2165,-
aftur og fram
íroknað ferðaavgjald

Bílegging áðrenn 2/12 2002. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi fra 29/8 til 10/10 og 22/10 til 9/12 2002.

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-11 ár minus 50%, børn undir 2 ár minus 90%.

Í minsta lagi burtur náttina millum leygardag og sunnudag. Í mesta lagi burtur í 30 dagar.



Vikuskiftisferð Vágar - Aberdeen

1479,-
aftur og fram
íroknað ferðaavgjald

Bílegging áðrenn 2/12 2002. Annars í seinasta lagi 7 dagar áðrenn fráferð. Tilboðið er galdandi fra 29/8 til 9/12 2002.

Í mesta lagi burtur í 4 dagar. Fráferðin skal vera hósdag - heimferðin skal vera mánadag.

2 fólk ferðast saman (annað kann vera eitt barn). 2-11 ár minus 50%, børn undir 2 ár minus 90%.

Bílegging hjá Atlantic Airways og á øllum ferðaskrivstovum

ATLANTIC AIRWAYS
Flogvøllurin · FO-380 Sørvágur
Tel: 34 10 10 · Fax 34 10 01 · booking@atlantic.fo
www.atlantic.fo